# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 21.10.2024 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Martin í Nesi
Eir J. Norðberg
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 6.

1. **102-42-2024: Byggiverkætlan Snæbjarnarvegur.**

   Tá freistin at lata inn boð uppá matr. nr. 524s, 524t og 524u í Hvalba var úti tann 14.10.2024, var eittans boð innkomið. Hetta er frá MTV Byggivirki, ið bjóðar kr. 226.200,00 fyri grundøkini.

   **Fíggjarnevndin 21.10.2024:**

   Nevndin mælir bygdarráðnum til at taka av hesum tilboði.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

2. **102-44-2024: Umsókn um stuðul til minnismerki.**

   Umsókn um stuðul til uppsetan av minnismerki um bjargaferð í Ásmundarstakki.

   **Fíggjarnevndin 21.10.2024:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla hesum við upp til kr. 20.000,00.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

3. **102-102-2023: Tilboð uppá nýggja lyftu til Sambýlið.**

   Tilboðið frá TM-Import:

   Motala lyft – 500 kg – 3 hæddir kr. 286.400,00 uttan MVG (frakt+uppsetan íroknað).

   **Trivnaðarnevndin 14.10.2024:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum.

   **Fíggjarnevndin 21.10.2024:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum.

**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

4. **102-69-2023: Skriv viðvíkjandi gøtunavni.**
Umsókn um adressu til neystið á Bíargarði, matr. nr. 339h, Hvalba.
**Tekniska nevnd 16.10.2024:**
Nevndin hevur viðgjørt málið fyrr (14.09.2023). Nevndin mælir til, at vegurin eitur Bíargarður og at adressurnar byrja frá matr. nr. 265 vestanfyri Minnisvarðan og fáa nr. 2, 4, 6 o.s.v. eystureftir. Eystanfyri Minnisvarðan byrjar matr. nr. 262 við nr. 1 og so verður farið víðari við nr. 3, 5, 7, 9 o.s.v. eystureftir.
**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og arbeiða víðari við hesum.

5. **102-46-2024: Fíggjarætlan 2025 – 1. viðgerð.**
Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 37.453.000,00, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 10.243.000,00 og afturgjald av skuld kr. 3.000.000,00.
Inntøkurnar eru mettar til kr. 36.543.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 10.243.000,00 sambært meting frá FMR.
**Fíggjarnevndin 21.10.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til, at skattaprosentið verður broytt úr 20,4% til 19,95%, barnafrádrátturin hækkar úr kr. 6.500,00 til kr. 8.000,00. Harumframt at frítíðarkort upp til kr. 2.000,00 verður latið børnum upp til 18 ár til luttøku í ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi og at játta 10 tímar um vikuna til samskipara av ungdómsarbeiði í sókníni.
**Avgerð**:
Samtykt við 6 atkvøðum fyri at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

6. **102-37-2024: Tilboð frá Andrias Olsen Fa.**
Nýtt tilboð frá Andrias Olsen Fa., eftir at Vega- og havnanevndin á seinasta fundi ynskti eitt meira útgreinað tilboð at taka støðu til.
**Fíggjarnevndin 21.10.2024:**
Nevndin er jaliga sinnað, men letur upp til bygdarráðið at taka støðu til málið.
**Avgerð:**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri at taka av tilboðnum frá Andrias Olsen Fa.

7. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson
Martin í Nesi Eir J. Norðberg Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen